KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 12.11.2015 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245 Gerðabók

**Nevndarlimir:** Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen og Atli S. Justinussen

Varalimir: Jan Gardar møtti fyri Herfrí J. Sørensen

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, skrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 112/15 | 15/01065-2 | Býráðslimur burturstaddur (nov./des. 2015) - Herfrí J. Sørensen |
| 113/15 | 15/00937-3 | Friðing av øki við Borðoyarvík |
| 114/15 | 15/00958-2 | Uppskot um makaskifti |
| 115/15 | 15/00540-5 | Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2015 – *fyrra viðgerð* |
| 116/15 | 15/00541-5 | Eykajáttan til Námsfrøðisligu Ráðgevingina 2015 – *fyrra viðgerð* |
| 117/15 | 15/00543-4 | Eykajáttan til smábarna Gigna 2015 – *fyrra viðgerð* |
| 118/15 | 15/00544-4 | Eykajáttan til Húsið 2015 – *fyrra viðgerð* |
| 119/15 | 15/00213-15 | Eykajáttan til Norðoyrarnevndina í 2015 - *seinna viðgerð* |
| 120/15 | 15/00534-23 | Fíggjarætlan 2016, Kl. Býráð – *seinna viðgerð* |

## 112/15
## 15/01065 Býráðslimur burturstaddur (nov./des. 2015) - Herfrí J. Sørensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð | 12.11.2015 | 112/15 | |

**Frágreiðing um málið:**
Herfrí J. Sørensen, býráðslimur, hevur umvegis teldupost boðað borgarstjóranum frá, at hon verður burturstødd til býráðsfundin 12. nov. 2015 og tí ynskir, at fyrsti varalimur floksins fær boð at møta.

Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti tiltakslimur fólkafloksins Erling Petersen. Men av tí at Erling Petersen longu hevur sæti í býráðnum, tí annar býráðslimur á sama lista er í farloyvi, er neyðugt at kalla næstvalda tiltakslim inn. Næstvaldi tiltakslimur er Óli M. Lassen, men hann hevur eisini boðað frá, at honum berst frá at møta. Triðivaldi á listanum er Jan Gardar, og verður hann tí at møta vegna Herfrí J. Sørensen til býráðsfundin 12. nov. 2015.

**Lógargrundarlag:**

Kommunustýrislógin (KSL), grein 18, stk. 2:
*Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.*
KSL, grein 18, stk. 3:
*Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

**Tilmæli:**
Mælt verður býráðnum til lata Jan Gardar taka sæti í býráðnum á fundinum 12. nov. 2015.

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at lata Jan Gardar taka sæti í býráðnum á fundinum 12. nov. 2015.

## 113/15
## 15/00937 Friðing av øki við Borðoyarvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 02.11.2015 | 101/15 | |
| 2 Mentanarnevndin | 02.11.2015 | 40/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 12.11.2015 | 113/15 | |

**Frágreiðing um málið:**
Vístverður til skriv dagf. 1. oktober 2015 frá býráðslimunum Óluvu Klettskarð og Kristian Eli Zachariasen um friðing av øki við Borðoyarvík – millum Mækjuvík og Hellisenda.

Økið er í Almennu Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu útlagt sum D1-øki, har ásetingin er soljóðandi:

> ***Grønt øki** – **fríøki***
> *Park ella náttúruøki. Støða verður tikin til neystabygging í hvørjum einstøkum føri (friðingarmyndugleikar)*
> *Bygningshædd: 4,5 m til mønu*

---

Á heimasíðuni hjá **savn.fo** verður sagt, at ein friðing í útgangsstøði er bindandi í alla framtíð. Aðrastaðni stendur á síðuni, at kommunur, við lógini um býarskipanir og byggisamtyktir, hava tað týdningarmesta amboðið til at taka sær av mentanararvinum. – Sí niðanfyri vistu útklipp frá heimasíðuni hjá Søvnum Landsins:

## Kommunur og fornminni

Løgtingslógin um býarskipanir og byggisamtyktir veitir kommunalum myndugleikum heimild fyri viðtøkum um brúk og vernd av økjum, t.d. við atliti at mentanarminnum.

Ætlanin við lógini er at leggja til rættis brúk av økjum og bygging til frama fyri hin einstaka og samfelagið. Í hesum liggur eisini ein skylda til at taka virðini, sum mentanarminnini umboða, við í plan- og byggimálsviðgerðina.

Lógin um býarskipanir og byggisamtyktir er týdningarmesta amboðið hjá kommununum til at taka sær av mentanarminnum. Vernd við byggisamtykt er ein dynamiskur verndarháttur, tí byggisamtyktir verða við jøvnum millumbilum dagførdar.

Mælt verður til, at kommunur altíð senda Landsantikvarinum/Føroya Fornminnissavni ætlanir um byggisamtyktir til hoyringar

## Hvør kann reisa friðingarmál?

Friðingarmál verða reist av landsantikvarinum. Tað vanliga er, at Føroya Fornminnissavn, kannar, um tað eru bygningar, ið eiga at verða friðaðir.

Landsantikvarurin kann eisini reisa friðingarmál við støði í áheitanum frá ánarum, grannum ella øðrum áhugaðum. Send verður tá inn ein lýsing við viðkomandi upplýsingum. Til ber eisini at ringja.

Síðan metir Landsantikvarurin, um hann vil reisa friðingarmál.

Landsantikvarurin og Fornminnissavnið svara øllum áheitanum, uttan um til, um málið heldur fram ella áheitanin verður avvíst.

## Málsgongdin

Ein friðing er í útgangsstøðinum bindandi í alla framtíð. Tí er neyðugt, at avgerðir í friðingarmálum verða tiknar á fakliga hollum støði. Eisini er neyðugt at taka borgarar og serliga tey, ið hava áhugamál á røkja við atliti at tí, ið uppskot er um at friða, uppí málsviðgerðina eins og fyriskipað í lóg um almenna fyrisiting. Av tí at alt hetta er neyðugt, er friðingartilgongdin altíð drúgv.

**Tilmæli:**
Út frá omanfyri lýsta verða avvarðandi nevndir at umrøða spurningin, um farast skal í holt við tilgongdina

- við friðing av økinum millum Mækjuvík og Hellisenda, ella
- at skerpa ásetingina í byggisamtyktini við at nokta allari bygging – galdandi fyri umrødda øki.
  (Til kunningar verður upplýst, at mál 14/00861 – samtykt á býráðsundi 30.04.2015 - er sent friðingarmyndugleikunum til viðgerðar í samband við uppafturbygging og víðkan av neysti innanfyri aktuella økið millum Hellisenda og Mækjuvík).

**UBN 02-11-2015**: Nevndin tekur undir við at skerpa ásetingina í byggisamtyktini við at nokta allari bygging – galdandi fyri umrødda øki.

**MeN 02-11-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 02.11.15.

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 02-11-2015 og MeN 02-11-2015.

## 114/15
## 15/00958 Uppskot um makaskifti millum matr. nr. 405/406

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 02.11.2015 | 106/15 | |
| 2 Tekniska Nevnd | 04.11.2015 | 43/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 12.11.2015 | 114/15 | |

**Frágreiðing um málið:**
Vístverður til teldupost dagf. 13. sept. 2015, har spurt verður um møguleikan fyri at makaskifta geiran sunnanfyri matr. nr. 406 við gongubreytarøkið vestanfyri matr. nr. 405 og 406. Umskipanin ber í sær, at kommunan letur uml. 10 $m^2$ til 405/406, meðan 405/406 lata uml. 14 $m^2$ til kommununa.
Fyrimunurin við makaskiftinum er, at kommunan við hesum verður eigari av gongubreytarlendinum, meðan vansin er, at einasta kommunala atkoman til fjørulendið niðanfyri húsaleingjuna fer av kommunalum í privatar hendur.

**Lógargrundarlag:**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Av tí at tað í umsóknini verður vístil møguliga meirbygging á økið, verður lagt upp til at bíða við støðutakan til makaskifti, til greiða er fingin á, um játtað verður byggiloyvi til meirbygging – hetta vísandi til ásetingarnar í byggisamtyktini, har áseting um max ábygging er 50%.

**UBN 02-11-2015**: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 27-10-2015

**TN 04-11-2015:** Nevndin tekur undir við UBN 02-11-2015.

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við UBN 02-11-2015 og TN 04-11-2015.

## 115/15
## 15/00540 Eykajáttan til Barnaverndartænastuna 2015 – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 03.11.2015 | 47/15 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.11.2015 | 101/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 12.11.2015 | 115/15 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 10.12.2015 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til viðfesta tilmælið og nevndarsamtyktina í Trivnaðarnevndini 1. juli 2015, verður málið við hesum av nýggjum lagt fyri.

Rationaliseringsbólkurin hevur viðgjørt støðuna í sambandi við hesa eykajáttan, og er staðfest, at tað í inniverandi ári ikki er gjørligt at umgangast hesar eykajáttanir.

Rationaliseringsbólkurin er nú í gongd við sítt arbeiði við møguligum umleggingum, og eitt fyrsta tilmæli verður lagt fyri hetta umfarið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina útreiðslu, uttan at játtan frá kommununi fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí viðfesta tilmæli til fundin 1. juli 2015.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at veita nevndu eykajáttan.

**TrN B&U 03-11-2015:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

**FíN 10-11-2015:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

## 116/15
## 15/00541 Eykajáttan til Námsfrøðisligu Ráðgevingina 2015 – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 03.11.2015 | 48/15 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.11.2015 | 102/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 12.11.2015 | 116/15 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 10.12.2015 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til viðfesta tilmælið og nevndarsamtyktina í Trivnaðarnevndini 1. juli 2015, verður málið við hesum av nýggjum lagt fyri.

Rationaliseringsbólkurin hevur viðgjørt støðuna í sambandi við hesa eykajáttan, og er staðfest, at tað í inniverandi ári ikki er gjørligt at umgangast hesar eykajáttanir.

Rationaliseringsbólkurin er nú í gongd við sítt arbeiði við møguligum umleggingum, og eitt fyrsta tilmæli verður lagt fyri hetta umfarið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina útreiðslu, uttan at játtan frá kommununi fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí viðfesta tilmæli til fundin 1. juli 2015.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at veita nevndu eykajáttan.

**TRN B&U 03-11-2015:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

**FíN 10-11-2015:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

## 117/15
## 15/00543 Eykajáttan til smábarna Gigna 2015 – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 03.11.2015 | 49/15 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.11.2015 | 103/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 12.11.2015 | 117/15 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 10.12.2015 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til viðfesta tilmælið og nevndarsamtyktina í Trivnaðarnevndini 1. juli 2015, verður málið við hesum av nýggjum lagt fyri.

Rationaliseringsbólkurin hevur viðgjørt støðuna í sambandi við hesa eykajáttan, og er staðfest, at tað í inniverandi ári ikki er gjørligt at umgangast hesar eykajáttanir.

Rationaliseringsbólkurin er nú í gongd við sítt arbeiði við møguligum umleggingum, og eitt fyrsta tilmæli verður lagt fyri hetta umfarið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina útreiðslu, uttan at játtan frá kommununi fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí viðfesta tilmæli til fundin 1. juli 2015.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at veita nevndu eykajáttan.

**TrN B&U 03-11-2015:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum dagfest 02-11-2015

**FíN 10-11-2015:** Nevndin tekur undir við TrN B&U 03-11-2015

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við TrN B&U 03-11-2015 og FíN 10-11-2015.

## 118/15
## 15/00544 Eykajáttan til Húsið 2015 – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung" | 03.11.2015 | 50/15 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.11.2015 | 104/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 12.11.2015 | 118/15 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 10.12.2015 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til viðfesta tilmælið og nevndarsamtyktina í Trivnaðarnevndini 1. juli 2015, verður málið við hesum av nýggjum lagt fyri.

Rationaliseringsbólkurin hevur viðgjørt støðuna í sambandi við hesa eykajáttan, og er staðfest, at tað í inniverandi ári ikki er gjørligt at umgangast hesar eykajáttanir.

Rationaliseringsbólkurin er nú í gongd við sítt arbeiði við møguligum umleggingum, og eitt fyrsta tilmæli verður lagt fyri hetta umfarið.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin ásetur, at ikki kann farast undir eina útreiðslu, uttan at játtan frá kommununi fyriliggur frammanundan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sí viðfesta tilmæli til fundin 1. juli 2015.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at veita nevndu eykajáttan.

**TRN B&U 03-11-2015:** Nevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum dagfest 02.11.15.

**FíN 10-11-2015:** Nevndin tekur undir við eykajáttanini fyri 2015, men at raksturin fyri 2016 verður tikin uppaftur í desember 2015.

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við FíN 10-11-2015.

## 119/15
## 15/00213 Eykajáttan til Norðoyrarnevndina í 2015 - *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska Nevnd | 30.09.2015 | 37/15 | |
| 2 Fíggjarnevndin | 06.10.2015 | 80/15 | |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 08.10.2015 | 106/15 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 12.11.2015 | 119/15 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð samtykt av býráðnum 8. okt. 2015.

**TN 30-09-2015:** Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 25-09-2015

**FíN 06-10-2015:** Nevndin tekur undir við TN 30-09-2015

**Býráðsins samtykt 08-10-2015:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð at taka undir við TN 30-09-2015 og FíN 06-10-2015

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir býráðssamtyktini 08-10-2015.

## 120/15
## 15/00534 Fíggjarætlan 2016, Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 17.09.2015 | 82/15 | |
| 2 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 12.11.2015 | 120/15 | |

**Frágreiðing um málið:**
Nevndir Klaksvíkar býráðs hava á tveimum temafundum viðgjørt fíggjarætlanina 2016 hjá Klaksvíkar býráð. Tann 1. okt. varð uppskot til raksturin 2016 viðgjørt, og tann 5. nov. 2016 vóru íløgurnar og tann samlaði fíggjarkarmurin viðgjørd.

Nevndirnar taka undir við niðanfyristandandi fíggjarkarmi fyri 2016:

| Klaksvíkar kommuna Fíggjarætlan 2016 | 1.000 kr. |
|---|---|
| **Kommunugrein** | **2016** |
| Kommunal fyrisiting | 17.505 |
| Almanna- og heilsumál | 63.181 |
| Børn og ung | 33.582 |
| Útbúgving og gransking | 9.308 |
| Mentan og frítíð | 10.361 |
| Teknisk mál | 17.562 |
| Kommunalt virki | 11.677 |
| **Rakstrarútreiðslur** | **163.177** |
| Rentustuðul | 5.000 |
| Fíggjarútreiðslur netto | 6.500 |
| **Inntøkur** | **-223.380** |
| **Rakstrarúrslit** | **-48.703** |
| **Íløgur** | **38.900** |
| **RLÚ-úrslit** | **-9.803** |
| | |
| **Á Skúlatrøð** | **17.000** |
| **Spillivatn og sjóhiti** | **8.400** |
| **Fastognir** | **2.000** |
| **Vegir íløga/maskinir** | **4.900** |
| **Byggibúning bústaðir** | **1.400** |
| **Mentanarpallur** | **2.200** |
| **Faktorshúsini** | **500** |
| **Havna- og Vinnuøkið** | **1.500** |
| **Kirkjugarður** | **1.000** |
| **Íløgur í alt** | **38.900** |

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Málið verður soleiðis sent býráðnum til endaliga samtykt av fíggjarætlan býráðsins fyri 2016. Somuleiðis at skattaprosentið verður sett til 20,75% og barnafrádrátturin 4.500 kr.

**Býráðsins samtykt 12-11-2015:**
Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarkarminum fyri 2016, sum samtyktur av føstu nevndum býráðsins á temafundi II, 5. nov. 2015.
Harumframt einmælt samtykt at taka undir við einum skattaprosenti á 20,75 % og einum barnafrádrátti á 4.500 kr.

**OMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**